

Mynd: Dim/Jens Kristian

Í gjár fyrrapartin vóru umboð fyri almennar stovnar, feløg og tíðindatænastuna boðin um borð á amerikanska seismikkskipið SEA STAR, sum hevur heimstað í Bahamaoyggjunum. Seinnapartin var høvi hjá almenninginum at vitja umborð. Skipið kom á Havnina hósdagin og skal gera seismiskar kanningar á føroyska sjóøkinum komandi mánaðirnar. Manningin vísti teim vitjandi kring um borð á skipinum, sum soleiðis fingu fyrsta rákan at kenna av einum møguliga komandi oljuævintýri í Føroyum. Í komandi blaði verður sagt frá vitjanini umborð og teim tólum og útgerð, manningin sýndi.

Inn í oljuævintýrið

Todi strembar eftir einum yrkissáttmála

22 ára gamli Todi Jónsson, ið fýra ferðir hevur roynt seg á danska superliga-liðnum, Lyngby, hevur í løtuni summarfrí. 1. juli fer hann aftur at stríðast fyri plássinum á liðnum. Einans arbeiði, fótbóltsvenjing og svøvnur eru á gerandisskránni.

DIA MIDJORD



Hann er 22 ára gamalur og hevur spælt fýra dystir fyri danska superligaliðið Lyngby. Eitt mál er hann eisini noteraður fyri *Mynd: Dim/Jens Kr. Vang*

Um jóltíðir fekk evnaríki klaksvíkingurin, Todi Jónsson, loyvi frá venjaranum í Lyngby, Michael Schäfer, at hann kundi venja við superliga-hópinum tvær reisur um vikuna. 1. mars slapp so Todi at venja fast við hesum hópi, og tað kann ikki sigast hava gingið illa hjá Toda.

Nú kappingin endaði seinasta sunnudag, hevur klaksvíkingurin spælt 1 heilan dyst á liðnum og verið við í trimum øðrum dystum. Hann byrjaði inni móti OB og varð úttikin, tá okkurt um 20 min. vóru eftir. Móti FCK kom hann inn í 2. hálvleiki og móti Ikast fór hann av vøllinum í hálvleiknum.

Móti AGF seinasta sunnudag spældi hann allan dystin, har tað eisini eydnaðist honum at skjóta málið til 4-0-leiðsluna hjá Lyngby. Sjálvur er Todi ikki í iva, hvør dystur var hansara besti.

– Tað er nokk einki at dylja yvir, at tað gekk mær betur og betur og seinasti dysturin var so avgjørt tann besti, greiðir Todi Jónsson frá.

Dagur er nátt og umvent

Todi hevur seinastu fýra dagarnar veið heima og vitjað familjuna. Hann arbeiðir annars sum náttarvakt á Hotel Phoenix í Keypmannahavn. Fer til arbeiðis kl. 23.00 og arbeiðir til kl. 07.00 um morgunin.

– Aftaná arbeiðstíð fari eg heim at leggja meg, til eg skal venja kl. 15.00. So fái eg mær aftur ein blund, áðrenn eg byrji arbeiðið, greiðir Todi frá.

– So eg vóni inniliga, at eg kann fáa ein sáttmála við Lyngby, tí hetta lívið er ikki serliga sunt. Dagurin verður viðvendur og máltíðirnar eru so sum so. Okkurt lætt í munnin verður tað ofta til, sigur klaksvíkingurin.

Í løtuni hevur Todi frí frá venjing. Frá seinasta sunnudegi og tríggjar vikur fram, skal øll fritíðin avgreiðast hjá Lyngby-spælarunum. 1. juli verður so byrjað aftur, og tá stendur sjálvandi hørð venjing á skránni, so spælararnir koma í venjing.

Spurdur um munin á danska og føroyska spælinum, sigur Todi, at í Danmark er ferðin munandi hægri.

– Ein verður tvungin at hugsa og handla skjótari, sigur hann.

Á landsliðnum

Todi Jónsson var millum teir 20 leikararnar, ið Allan Simonsen tók út til eysturríkisferðina, men henda verður kortini av ongum fyri Toda.

Hann verður noyddur at venja við Lyngby, um hann skal hava nakran møguleika at koma fast á liðið, og hetta hevur Allan Simonsen eisini givið honum loyvi til.

Todi ætlar at gera alt honum stendur í boði at fáa fæst pláss á liðnum. Venjing er hálvanannan tíma til tveir tímar hvønn gerandisdag. Mikudag verður vant tvær ferðir. Venjari verður aftur Michael Schäfer, ið Todi hevur alt gott at bera. Tað var jú hesin venjarin, ið tordi geva honum ein møguleika á liðnum.

Okkurt hevur frammi um, at Todi hevur skrivað ein tvey-ára sáttmála við Lyngby, men hetta avsannar Todi. Hann hevur ikki verið í sambandi við leiðsluna um hetta. Kortini hevur hann hoyrt okkurt um, at stjórin skal hava sagt hetta fyri okrum donskum blað.

Tá Todi í 1989/90 las til student í Árhus, leikti hann við unglingaliðnum hjá AGF. Og seinasta sunnudag, tá hann spældi við Lyngby móti AGF, spældi hann móti fleiri leikarum, ið hann vandi saman við í AGF.

Týska ferðavinnan bitið á hjá Smyril Line

Líkt er til, at arbeiðið, Smyril Line, Hotel Føroyar og Atlantic Airways gjørdu á sumri í fjør, er við at geva úrslit. Bara tað, at tað eydnaðist teimum at koma í heimskendar og heimsumfatandi ferðavinnufaldarar, var eitt stórt framstig. Í dag byrja týskarar so smátt at fáa eyguni upp fyri Føroyum.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Seinastu árini hevur Smyril Line tíðum fingið skotið í skógvarnar, at felagið hevur gjørt ov nógv við at fingið ferðandi við Norrønu av evropeiska meginlandinum til Íslands, og ikki til Føroya. Men í dag kann Smyril Line vísa á ítøkilig úrslit, sum partvís gera av við »Íslandsmytuna«:

– Fleiri týskarar koma í ár til Føroya sum beinleiðis fylgja av arbeiði, Smyril Line, Hotel Føroyar og Atlantic Airways gjørdu í fjør.

Tosaðu við týskar ferðaskrivstovur

Umboð fyri Smyril Line, Hotel Føroyar og Atlantic Airways vóru í týsklandi í juli mánaði í fjør. Ferðin varð ætlað at fáa týskarar at leggja meira merki til oyggjarnar í Norðuratlantshavi.

Á ferðini varð tosað og samráðst við stórar og kendar ferðaskrivstovur í Hamburg, Frankfurt og í München. Ferðaskrivstovurnar, tosað varð við, eru slíkar, ið frammanundan hava havt hampuliga nógv við Skandinavia at gjørt. Talan er um ferðaskrivstovur, ið ikki samstarva við ein og hvønn, men bert við tann partin av heimsins ferðavinnu, ið kann prógva dugnasemi og sum er álitandi.

Heri Niclasen, leiðari á ferðavinnudeildini hjá Smyril Line, sigur við *Dimmalætting*, at tað eydnaðist teimum at koma í fleiri týskar ferðavinnufaldarar. Og bara tað í sær sjálvum var eitt slag av einum sigri.

Ítøkilig úrslit

Smyril Line hevur gjørt programm, sum serliga er ætlað týskarum. Verður tikið av tilboðnum, kann tann ferðandi fara við bussi úr Týsklandi beinleiðis til Danmarkar, har farið verður umborð á Norrønu í Esbjerg.

Í Føroyum er so skipað fyri gisting, og hvønn einasta dag verður skipað fyri útferðum. Ferðafólkið ger sjálvt av, um farið verður avstað aftur við Norrønu ella við flogfari.

Umboðini á Smyril Line leggja dent á, at skipaðu útferðirnar eru lagdar soleiðis til rættis, at eisini onnur kunnu verða við, eisini føroyingar. Millum útferðartilboðini er rundvísing í Havnini, bustúrur úr Havn til Kirkjubøar, bátatúrur undir Vestmannabjørgini, Føroyakvøld í Norðurlandahúsinum, túrur til Saksunar, dagtúrur í Norðoyggjar o.s.fr.

Heri Niclasen leggur herðslu á, at skipað eisini verður fyri busstúrum fyri tey, sum bert steðga í Føroyum nakrar fáar tímar.

– Higartil hava bussarnir verið nærum fullsettir, sigur Heri Niclasen.

Tó at Smyril Line lítið og onki fær burturúr hesum busstúrum, meta tey túrarnar gagna samfelagnum sum heild, ikki minst sum árini ganga.

– Við einum slíkum busstúri fær ein ferðaleiðari sína dagløn, bussførarar og busseigarar fáa sítt, og so keypa tey ivaleyst eitthvørt, koma tey framvið einum handli. Og í seinasta enda er ikki óhugsandi, at hesi hava fingið smakkin av Føroyum sum ferðavinnulandi, og koma tí aftur, heldur Lis Rasmussen, leiðari á Hotel Føroyum.

Umframt nevndu túrar skipar Smyril Line eisini fyri túrum við Norðlýsinum. Og felags fyri allar skipaðu túrarnar hjá Smyril Line er, at óansað um bert eitt fólk møtir til ein av túrunum, so verður túrurin gjørdur. Bara veðrið kann forða fyri, at túrarnir verða gjøgnumførdir.

– Tað er at alstórum týdningi, at tann ferðandi fær tað, hann hevur fingið lovað. Eitt nøgt ferðafólk er gull vert, heldur Heri Niclasen.

Millum hálvthundrað og hundrað fólk hava higartil meldað seg til skipaðu túrarnar úr Týskland. Og hetta meta umboðini fyri Smyril Line vera ein góð byrjan.

– Vit merkja týðiliga, at tað hevði týdning, at vit í fjør fóru til Týsklands. Í dag koma alt fleiri týskarar hendanvegin, bæði vanlig ferðandi, men eisini framstandandi fólk innan ferðavinnuna, siga umboðini hjá Smyril Line.

Tey hava arbeitt hart við at fáa Føroyar umboðaðar í stórum og heimskendum týskum ferðavinnufaldarum, umboð fyri Smyril Line, Hotel Føroyar og Atlantic Airways. Á myndini vinstrumegin frá: Lis Rasmussen, leiðari á Hotel Føroyum, Maria Joensen, søludeildin á Smyril Line, Heri Niclasen, leiðari á ferðamannadeildini hjá Smyril Line, og Annika Andreasen, leiðari á flogdeildini hjá Smyril Line. *Mynd: Dim/Jens Kristian*